## Trúboðin nýggja heimasíðu

Í langa tíð hevur verið arbeitt við at fáa HYPERLINK "http://www.trubodin.fo" www.trubodin.fo dagførda. Í dag ber til at síggja úrslitið á netinum. Nýggja heimasíðan hevur nógv fleiri møguleikar í mun til gomlu síðuna. Til ber at leggja fleiri myndir til somu grein, til ber at skriva til spurnarkassan, ein kann atkvøða um ymiskt á síðuni, nógv fleiri møguleikar eru fyri lýsingum á síðuni, og tíðindini koma munandi betri til sjóndar á síðuni eins og tað er lættari at finna runt. Nýggja síðan hevur eisini fleiri upplýsingar enn gamla síðan hevði.

## Ungdómskvøld á Klaksvíkar bókasavni

Týskvøldið 13. mars kl. 19.30 verður ungdómskvøld á Klaksvíkar bókasavni, har ungfólk fara at framføra drama og ungir guitarleikarar úr Klaksvíkar Tónlistaskúla fara at framføra tónleik. Eisini fer 18 ára gamla Sigga Maria Hjalmarsdóttir Højgaard at lesa yrkingar úr yrkingasavni sínum "Orð hava tagnarskyldu", sum kom út í februar.

Ungdómskvøldið er fyri fyri ung úr 7. flokki og eldri. Hetta kvøldið verður eisini okkurt leskiligt at fáa.

# Føroyskt Himalaya á Sornfelli



*Elin Heinesen: "Her liggja so óendaliga nógvir ótroyttir møguleikar í Føroyum – ikki minst fyri einastandandi upplivingum – og í hesum tíðum, har upplivingarbúskapurin skapar størstu virðini í heiminum, so lat okkum vera við!"*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Hugsa sær, um vit nú brúktu hetta forkunnuga grótslottið uppi á Sornfelli sum ein upplivingardepil til almenningin og vitjandi uttanifrá, við holinum inn í fjallið sum eitt portur inn í ein ævintýraheim. Vit kundu t.d. brúkt hellini har inni til framsýningar bæði fyri børn og vaksin, sum lýstu søgur og sagnir úr Føroyum, umframt konsertir, fundir, skeiðvirksemi – kanska eitt kalda krígs museum, sum kundi vakt internationalan áhuga segði Elin Heinesen, stjóri á nýggja Vinnuframastovninum í Grækarismessurøðu síni í Havn sunnudagin. Vit geva Elin orðið:**

### Loyniligt ævintýraslott á Sornfelli

"Jú, vit hava eitt ævintýrligt land. Men hvussu kunnu vit skapa heilt einastandandi upplivingar, sum kundu gjørt hetta landið enn meira ævintýrkent fyri vitjandi enn onnur lond, vit kappast við? Vit kunnu t.d. hugsa stórt – tvs. vit kunnu skapa nøkur spektakuler vartekin her, ið fólk um allan heim kunnu gerast hugtikin av. Vit hava faktiskt veldugar møguleikar, harav eg gjarna vil nevna bara eitt hugskot til ein: 750 metrar uppi miðskeiðis á Streymoynni, liggur nakað, sum kundi blivið eitt heilt einastandandi vartekin, sum ikki kennir sín líka nakrastaðni í heiminum. Radarkuplarnar og hellini høgd inn í Sornfelli, sum NATO nú er rýmt úr, liggja har uppi – sum eitt loyniligt ævintýraslott høgt inn í grótið, við radarkuplunum sum torn, ið kneysa spelkin uppúr fjallatromini. Í mong, mong ár var hetta ævintýraslottið – eins og slottið í søguni um Tornurósu – óatkomiligt og bannað almenninginum at uppliva, men nú... nú sleppa vit endiliga at síggja, hvat goymir seg har uppi.

Tá veðrið er klárt, er útsýnið heilt fantastisk higanifrá yvir tað einastandandi jarðfrøðisliga fyribrigdið, sum Føroyar eru – vátasta landið í heiminum – kanska við pollamjørkanum dandandi í dølunum. Tað kenst sum eitt ævintýr. Sjálv havi eg verið uppi á Sornfelli einaferð við einum útlendingi í góðum veðri eitt vakurt kvøld, tá sólin setti. Hann greiddi frá, at hann einaferð hevði verið uppiá heimsins taki – Himalayafjøllunum, har tey máttu ganga í nógvar dagar fyri at koma so høgt upp, at tú kundi síggja útyvir fjallatopparnar. Hann segði, tað var 'a breathtaking experience'. 'You are lucky' segði hann, tí her koyrir tú bara 15 til 20 minuttir úr Havnini – ella ein hálvan tíma av flogvøllinum, so kanst tú fáa akkurát somu spektakuleru upplivingina – tað føldist akkurát líka 'breathtaking' sum í Himalaya at standa uppi á Sornfelli og síggja útyvir endaleysar raðir av fjallatoppum, segði hann! This is pure magic! Hann helt, at tað var heilt ótrúligt, at vit nærmast hildu hesa perluna loyniliga fyri umheiminum.

### Eitt eindømi í øllum heiminum

Hugsa sær, um vit nú brúktu